# Týdningur av nøvnum




*Tað er Forlagið Fannir, sum stendur stendur fyri útgávuni av bókini, sum er 232 síður til støddar. Bókin kostar 248 krónur*

**Nú fáa føroyingar fyri fyrstu ferð eina veruliga navnabók, har týdningurin av ymsu nøvnunum eisini framgongur**

ÚTGÁVA
*Jákup Mørk*

Í nøkur ár hava vit havt ein lista yvir fólkanøvn, sum eru góðkend í føroyska málinum. Men vit hava enn ikki havt eitt yvirlit yvir, hvat nøvnini í veruleikanum merkja.

Í grannalondunum hava fólk fleiri navnabøkur at kaga í, vilja tey kanna, hvat ið eitt fólkanavn møguliga merkir. Á alnetinum bjóða fleiri heimasíður seg fram at siga frá hesum sama.

NAVNABÓKIN - hvat man navn mítt merkja? er fyrsta royndin at lýsa føroysk fólkanøvn: Í bókini eru 726 konufólkanøvn og 842 mannfólkanøvn lýst.

Tað er Árni Dahl, sum hevur lagt bókina til rættis, og hevur hann við hesum givið enn eitt av sínum mongu ískoytum til føroyska bókmentaheimin. Grafik Studio gjørdi kápuna og Føroyaprent hevur prentað.

# 60.000 trøll á marknaðin

Fríggjadagin stendur J fyri Jólaøl. Eisini í Føroyum hevur siðurin við J-degnum vunnið frama, og á Restorff's Bryggjarí í Havn siga tey seg hava brynjað seg væl út.

Jólatrøllið, sum er teirra útgáva av jólaøli, verður tappað í hesum døgum, og samanlagt verður talan um einar 60.000 fløskur, sum í næstum fara á marknaðin.

Sagt verður, at trøllið er bryggjað sambært gamlari forskrift, har trý sløg av malti verða nýtt, umframt at løgurin eisini fær serliga viðgerð, sum tey siga er loynidómurin hjá bryggjarínum.

Hósdagin verður ølið sýnt avtakarum kring landið, og fríggjadagin verður so talan um J-dag.

**-mørk**

# - Altíð okkurt at gera

**Praktikanturin, Kristianna Kruse í Kollsbyrgi úr Felagsskúlanum á Oyrarbakka er í starvsvenjing í løtuni. Hon starvast í eini hárfríðkanarstovu í miðbýnum í Havn**

STARVSVENJING
*Orð/mynd: Rannveyg F. Joensen og Kirstin Khaliqhey*




*Kristianna Kruse í Kollsbyrgi svarar telefonini á hárfríðkanarstovuni hjá Madonnu*

Vit møttu Kristionnu í SunSet í SMS. Fyrst bíløgdu vit okkum okkurt at eta, og settust síðani niður at práta um starvsvenjingina í hárfríðkanarstovuni "Hjá Madonnu".

Kristionnu dámar væl at arbeiða hjá Madonnu. Starvsfólkini eru blíð og tóku væl ímóti henni, tá hon heldur smæðin kom til arbeiðis fyrsta dagin.

- Tað var eitt sindur pínligt í byrjanini, men starvsfólkini bóru yvir við mær, sigur hon, og rodnar um báðar kjálkarnar.

*Hvat er at gera hjá einum praktikanti á eini hárfríðkanarstovu?*

- Tað er næstan altíð okkurt at gera. Sum oftast vaski eg hárinum á kundunum, sópi gólvið, vaski íløt, føni og slætti hárið á kundunum, tá tað er klipt.

- So ger eg eisini kaffi, sum eg ikki dugdi áðrenn eg fór í starvsvenjing, sigur hon, og sær eitt sindur errin út.

*Hevði tú kunnað sæð hetta, sum títt framtíðar yrki?*

- Nei, tað er ikki akkurát eg. Eg vil heldur verða t.d. sálarfrøðingur ella okkurt tílíkt, ið hjálpir fólki við sálarligum trupulleikum.

- Tað arbeiðið meti eg vera eitt sera áhugavert og spennandi arbeiði, sigur Kristianna.

Tá vit vóru lidnar at eta fylgdu vit Kristionnu oman aftur til Madonnu og tóku eitt bílæt av henni í "action".

# Sølurás á Skála

**Vikuskiftið 5. og 6. november verður sølustevna á Ítróttarhøllini á Skála**

SØLUSTEVNA
*tíðindaskriv*

Tann sera vælumtókta sølustevnan undir navninum SøluRásin 2005 verður á Skála 5. og 6. nov.

Tað eru 4 feløg sum standa fyri stevnuni og eru tey St.ÍF - Strálan - Skála Ítróttarfelag og Skála Róðrarfelag.

Stevnan letur upp kl.15.leygardagin 5. nov. Bygdaráðsformaðurin Malena Thomsen setur stevnuna.Um framt tvær mótasýningar gjøgnum dagin koma Angela og Hannibal at undirhalda børnunum kl. 15.30. Og tað er meira enn so til børnini, tí kl.19 koma Trølla Pætur og Omman á pallin. Teir vælkendu brøðurnir Árni og Marnar koma at syngja og spæla á pallinum kl.21. Drigið verður millum seld atgongumerki kl.21.45

Sunnudagin verða dyrnar lætnar upp kl. 15. Og umframt tvær mótasýningar, eru eisini onnur tiltøk á skránni. Teir báðir Ásbjørn og Rógvi koma at undirhalda børnunum kl.16. Stórt vørutombola verður uppi í Bygdasalinum kl.17.30 og kl. 19 kemur Hilmar Jan at undirhalda á pallinum.

Stevnan endar við at Jens Marni og Kim syngja og spæla kl. 21.

Drigið verður síðan um seld atgongumerki fyri dagin.

Høvuðsvinningurin er ein kekkur áljóðandi 10.000,-kr, sum verður drigin millum øll seld atgongumerki fyri báðar dagarnar.

Sosialurin
Sosialurin
i

Vit bóka nær og fjar



· Bókhald
· Grannskoðan
· Roknskapur

Arbeiði kann eisini gerast á skrivstovu tíni!

Bókhaldsvirkið
Terji Dalsgaard
Tel 36 13 76 · Fax 36 13 09
www.bkv.fo